## Jákup um politikk

- Eg velji Sambandsflokkin, men eg havi næstan ongan áhuga fyri politikki. Teir bara tosa, og tað hendir einki. Tað er alt ov óspennandi fyri meg



## Pauli um trúgv

- Eg eri kristin. Vit hoyra til brøðrasamkomuna Siloa. Eg og Jákup plaga eisini at ganga í Philadelphia í Gøtu og í kirkjukjallarinum í Gøtu til ungdómsmøtir. Trúgvin hevur nógv at siga fyri meg í gerandisdegnum

# a hvør øðrum



*Í næstu viku fara brøðurnir Jákup og Pauli Mohr báðir til Oyggjaleikirnar at luttaka í svimjikappingum. Jákup, sum stendur vinstrumegin, er 18 ár. Pauli er 15 ár*
*Mynd: Høgni Thomsen*

smílandi.

Pápi teirra, Øssir Mohr, er við í nevndini hjá FS. Hann hevur ongantíð svomið til kappingar sjálvur, men hann er sera spentur nú.

- Tað eru sjálvandi børnini, sum gera at tú fært áhugan. Vit ferðast við teimum til allar kappingar. Vit fara eisini øll til Rhodos til Oyggjaleikirnar at heppa, sigur Øssur Mohr, sum umframt Jákup og Paula eigur eina yngri dóttir, sum eisini svimur.

### Eitt ár í senn

Jákup fer í FHS eftir summarfrítíðina. Pauli gongur í 9. flokki, og hann ætlar sær eisini í 10. flokk. Tað er óvist, hvussu leingi teir halda á við svimjingini.

- Nú fari eg so í skúla, og so fáa vit at síggja við svimjingini. Eg hugsi ikki so langt fram. Beint nú hugsi eg bara um Oyggjaleikirnar, sigur Jákup.

- Eg fari í 10. flokk, og eg ætli mær at halda fram við svimjingini. Eg vil vera ordiliga seriøsur og síggja, hvussu langt eg kann røkka, sigur Pauli.

Jákup er forlovaður í Havn, og hann vitjar damuna av og á. Pauli kennir tað tó ikki sum at hann hevur mist stórabeiggjan.

- Vit hava altíð fylgst nógv, og tað gera vit enn. Vit tosa nógv saman, og nú Jákup hevur fingið koyrikort, plagi eg at vera biltúr við honum. Eg fari av og á við, tá ið Jákup fer til Havnar. Tá fari eg at vitja onkran av svimjarunum í Havn, sigur Pauli.

### Biðjur áðrenn kapping

Jákup og Pauli kenna mangan trýstið, tá ið kappingarnar nærkast.

- Í svimjing ert tú púra einsamallur. Tú hevur ongan annan at skylda uppá, og tú ert eisini einsamallur um heiðurin, tá ið tað gongur væl, sigur Jákup.

Teir vísa á, at tað er týdningarmikið at seta seg upp áðrenn eina kapping.

- Eg biðji altíð áðrenn eina kapping. Eg biðji fyri øllum luttakarunum – at tað má gangast teimum og mær væl, sigur Pauli.

- Eg fari inn í meg sjálvan og práti ikki við nakran áðrenn kappingina. Eg kann kanska virka kaldur, men tað er einans tí, at eg eri fokuseraður, sigur Jákup.

Tað verður spennandi hjá brøðrunum Jákupi og Paula á Oyggjaleikunum, tá ið alt Føroya land saman við familjuni Mohr fer at fylgja við. Teir hava sett sær høg mál og líta eisini á, at teir kunnu liva upp til tey.

## Fakta

**Navn:** Jákup Mohr
**Føddur:** 15. januar 1989
**Forlovaður**

## Fakta

**Navn:** Paula Mohr
**Føddur:** 12. oktober 1991
**Stakur**